## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og regn. Seinnapartin hvassur vindur av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, seinnapartin hækkar hann upp í útnyrðing. Ælingur, um kvøldið sum vátaslettingur ella kavi. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum frostmarkið og ÷3 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi og norði og sólglottar, men kanska okkurt kavaælið. Hitalagið millum frostmarkið og ÷4 stig – um náttina niður í ÷6 stig.

# Føroyskur valfepur í Reykjavík

**Tórleif Johannesen, sjómanstrúboðari, greiðir frá valkvøldinum á Sjómansheiminum Ørkini í Reykjavík**

LØGTINSVALIÐ
*Torleif Johannesen*



*Rúni Hentze, fyrrverandi løgtingsmaður, er nú leiðari á Sjómansheiminum Ørkini í Reykjavík. Valkvøldið hittust »íslendskir« føroyingar á Sjómansheiminum at fylgja valinum um alentið*
*Mynd: Torleif Johannesen*

Valdagin 20 januar var ikki bara valfepur í Føroyum. Hann hevði eisini spreitt seg í ein útnyring, heilt yvir til Íslands. Grundin til valfepurin í Reykjavík var ikki bara tann, at íslendingar eru áhugaðir í føroyskum politikki, og serliga í spurninginum um samband ella loysing.

Høvuðsgrundin var, at fleiri av teimum uml. 300 føroyingunum sum búgva í Reykjavík og har umleiðir, eru áhugaðir í føroyskum politikki.

Tað er nýggi leiðarin á føroyska sjómansheiminum, Ørkini, Rúni Hentze eisini. Hann var tingmaður fyri Páll á Reynatúgvu síðsta valskeið. Hann stillaði ikki uppaftur hesaferð, tí hann skuldi verða »skipari« á Ørkini frá fyrsta januar.

### Úrslitini á stórskíggja

Fyrst í árinum hevði føroyingafelagið sent bræv út til sínar 250 limir. Har kunnaðu tey m.a. um, at undirritaði skuldi vitja og hava møtir. Samstundis boðaðu tey frá, at valkvøldið skipaði føroyingafelagið og sjómansheimið fyri hugna á heiminum, har fylgjast skuldi við valinum á stórskíggja yvir alneitið.

Seinnapartin valdagin var gjørt klárt. Føroysk fløgg komu á borðini í matstovuni, samstundis sum uppvørpan (video-kanónin) var riggað til.

Limir í føroyingafelagnum komu við køkum og heimið gav kaffi.

Peningurin fyri drekkamunnin fór til heimið.

Kl.19.45 komu tey fyrstu. Tað merktist skjótt á teimum, at hóast fleiri teirra høvdu búð í Íslandi í nógv ár, so vóru tey rættiliga spent upp á valið.

Úrslitini blivu eisini gjølla kannað so hvørt tey komu upp á veggin. Tosið gekk lívliga, samstundis sum køkurnar blivu skolaðar niður við kaffi ella te.

Tey uml. 50 fólkini, ið vitjaðu inn á heimið valkvøldið, høvdu tað rættiliga hugnaligt.

Tá endaliga úrslitið kom, var hýrurin sera góður á teimum flestu. Rúni slongdi harmonikuna um herðarnar, Rúni Eysturlíð og Mads Jacobsen tóku guitararnar, samstundis sum Grønasangbók kom fram. Sangir sum t. d. »Føroyar tá sólin í tindrandi megi« vóru sungnir.

Klokkan var farin av eitt áðrenn tey síðstu fóru til hús.

Jú, jú! Útisetar kunnu sanniliga hava tað hugnaligt, í samband við eitt løgtingsval.

### Flest loysingarfólk

Valkvøldið merktist týðuliga, at meirilutin av teimum uppmøttu vóru loysingarfólk. Ein tók so ramliga til, at allir føroyingar sum eru í Ísland, eru loysingarfólk. Eru teir ikki tað tá teir koma, so gerast teir tað eftir eina tíð í Íslandi. Møguliga er hetta rætt. Valkvøldið var í øllum førum ringt, fyri ikki at siga ógjørligt at hoyra málið á nøkrum sambandsfólki.

Ein av teimum, sum fyrst møtti upp valkvøldið, var 87 ára gamla Paulina Jónsson, úr Froðba.

Hon er íðið loysingarfólk, hóast hon hevur búð 57 ár í Íslandi.

### Vælkomin á Ørkina

Sjómansheimið, sum var vígt 2 juni 1991, hevur øll árini virkað sum sjómansheim/hotell, men eisini sum eitt slag av føroyskari sendistovu. Har hittast føroyingar til álvara og gaman. Har gista skúlanæmingar, sjómenn, og annars vitjandi úr nógvum londum. Vetrarhálvárið er friðaligt, við nøkrum fastbúgvandi næmingum, og annars vitjandi, sum tørva gisting. Um summarið er heimið væl vitjað.

Tá er ein altjóða dámur yvir heiminum, við fólkum úr ymsum londum.

Rúni sigur, at føroyingar eru sjálvandi hjartaliga vælkomnir á Ørkina at búgva ella bara at vitja inn á gólvið. Nú er gott flogsamband við Atlantsflog til Ísland, so nú er lagað manni at koma ein túr til Reykjavíkar at vitjað og síggja seg um í hesum fjølbroytta og spennandi býnum.

Hann sigur eisini, at tey sum ætla sær at gista á Ørkini í summar, mugu bíleggja í rímiligari tíð, tí útlendingar bíleggja so tíðliga.

Føroyingar eru altíð vælkomnir at ringja ella senda teldupost, tá teir hava ørindir til Sjómansheimið.

Í løtuni arbeiða bara føroyingar á heiminum, og teir lata heilsa vinum og kenningum í Føroyum.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷14 |
| Nuuk | ÷9 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | ÷3 |
| Saint John's | ÷2 |
| Halifax | ÷4 |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 9 |
| Tromsø | ÷7 |
| Bergen | ÷1 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | ÷11 |
| Keypmannah. | ÷4 |
| Helsinki | ÷14 |
| Moskva | ÷9 |
| Berlin | ÷2 |
| Warzawa | ÷4 |
| Kiev | ÷9 |
| Bukarest | ÷3 |
| Paris | 6 |
| Madrid | 7 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 15 |
| Athen | 6 |
| Malta | 13 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | ÷2 |
| New Dehli | 17 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | – |
| New York | ÷3 |
| Miami | 17 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 29 |

### LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 982 hPa. yvir Atlantshavinum á 52N-36V fer móti Íslandi og dýpist.



Djúpa lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer spakuliga í landnyrðing og kuldabrúgvin haðani verður yvir Føroyum fríggjamorgunin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 21/01 kl. 06⁰⁰– 22/01 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,5°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° - Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 21/01 kl. 06⁰⁰–22/01 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 132,9 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

19. januar: Mánin næstur jørðini
21. januar: Tendring
29. januar: Fyrra kvarter
31. januar: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. jan | 07.52 | 20.19 | 06.52 | 19.19 | 07.07 | 19.34 | 09.52 | 22.19 | 10.52 | 23.19 | 06.07 | 18.34 | 05.07 | 17.34 | 08.07 | 20.34 | 09.07 | 21.34 | 07.37 | 20.04 | 08.52 | 21.19 |
| 24. jan | 08.44 | 21.09 | 07.44 | 20.09 | 07.59 | 20.24 | 10.44 | 23.09 | 11.44 | — | 06.59 | 19.24 | 05.59 | 18.24 | 08.59 | 21.24 | 09.59 | 22.24 | 08.29 | 20.54 | 09.44 | 22.09 |
| 25. jan | 09.32 | 21.54 | 08.32 | 20.54 | 08.47 | 21.09 | 11.32 | 23.54 | 00.09 | 12.32 | 07.47 | 20.09 | 06.47 | 19.09 | 09.47 | 22.09 | 10.47 | 23.09 | 09.17 | 21.39 | 10.32 | 22.54 |
| 26. jan | 10.14 | 22.35 | 09.14 | 21.35 | 09.29 | 21.50 | — | 12.14 | 00.54 | 13.14 | 08.29 | 20.50 | 07.29 | 19.50 | 10.29 | 22.50 | 11.29 | 23.50 | 09.59 | 22.20 | 11.14 | 23.35 |

5 707265 100050 >